# Seinasti starvsdagur hjá Kinn

MÓTTØKA

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Mikudagin 29. august var almenn móttøka á Dómaraskrivstovuni í Havn í sambandi við, at Kinn Magnussen skrivstovuleiðari, fór úr starvi. Har vóru starvsfelagar, vinir og familja. Henrik Møller, sorinskrivari, helt eisini eina talu í sambandi við hennara seinasta starvsdag.

Kinn arbeiddi næstan 35 ár á Dómaraskrivstovuni. Hon byrjaði í 1963 sum avloysari, og fyrst í 70-unum varð hon sett í fast starv. Dómarin er fastur formaður í ymiskum ráðum sum t.d. Vanlukkutrygginga rráðnum, og tey fyrstu árini var arbeiði hjá Kinn fyri tað mesta í hesum sambandi.

Hon hevur arbeitt undir fleiri ymiskum dómarum. Tann fyrsti var E.A. Bjørk, Oppermann, Joen H. Andreasen, Jørgen B. Petersen, Majken Johansen og Jens Schultz- Hansen. Í dag eru tveir dómarar: Henrik Møller og Niels Toft-Vandborg.

Seinnu árini var Kinn leiðari á Dómaraskrivstovuni, har eini 25 fólk eru í starvi.

Kinn er gift Bjarna Magnussen, maskinmeistara, úr Kvívík. Tey eiga børnini: Suni, Tummas, Bjarni og Marjun, sum øll búgva í høvuðsstaðnum. Barnabørnini eru 11 í tali.

Hóast Kinn er givin við sínum vanliga arbeiði, sigur hon, at hon hevur fleiri frítíðarítriv og nokk at takast við.

**mg**



*Kinn Magnussen og Henrik Møller, dómari, sum helt eina talu fyri henni undir móttøkuni*



*Hjúnini Bjarni og Kinn Magnussen*



*Familjan var eisini við til móttøkuna. Uttast til høgru synirnir Tummas og Suni*



*Fyrrverandi dómarin Joen H. Andreasen var eisini við til móttøkuna*



*Nógv fólk stukku inn á gólvið*



*Starvsfelagar og familja*